TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Mentamáladeildin**

Er deild undir trivnaðarfyrisitingini og hevur m.a. umsitingina av dagstovnum, dagrøktini, skúlum frítíðarskúlum og Margarinfabrikkini um hendi. Á deildini starvast 5 fólk.

Deildin heldur til í ráðhúsinum á Vaglinum í Havn, saman við stjórnarskrivstovuni og starvsfólkadeildini.

www.torshavn.fo

## Avloysari fyri málsviðgera

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir avloysara fyri málsviðgera til barna-og ungdómsdeildina á mentamáladeildini.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið er fjølbroytt, og arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum hesar:
- málsviðgerð
- at fyrireika mál
- at skriva brøv
- at gera heimasíður
- at skriva fundarfrásagnir
- at gera reglur, vegleiðingar og mannagongdir
- at samskifta við dagstovnarnar, frítíðarskúlarnar, dagrøktina og Margarinfabrikkinia
- arbeiði í sambandi við nýggju dagstovnalógina

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal:
- hava viðkomandi útbúgving
- hava fyrisitingarligar royndir
- hava teldukunnleika.
- duga føroyskt til lítar
- hava góð samstarvsevni
- vera fyrikomandi
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- duga at síggja møguleikar framum forðingar

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tíðaravmarkað fulltíðarstarv og verður sett 1. apríl 2004 til 1. januar 2005. Løn sambært sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelag.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert starv við nógvum og fjølbroyttum uppgávum, har tú hevur møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. mars 2004.



## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 2. apríl 2004, kl. 09.00** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognirnar **matr. nr. 27, 31 og 37, Norðtoftir,** (AS 1-41/2003).

Talan er um jarðarstykkir:

Matr. nr. 27, Norðtoftir: 1 gyllin av parti í haga Norðtoftahagi, 2/9 í felags matr. nr. 45.
Matr. nr. 31, Norðtoftir: 1 gyllin av parti í Norðtoftahagi, 2/9 í felags matr. nr. 45.
Matr. nr. 37, Norðtoftir: 2 gyllin og 10 skinn av parti í haga Norðtoftahagi, 5/9 í felags matr. nr. 45.

Víst verður annars til tvingsilssøluuppstillingarnar, sum eru gjørdar í samband við tvingsilssøluna.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tel. 311260, (sak nr. 4538001),** sum kann geva upplýsingar um ognirnar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognirnar.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
hin 4. mars 2004



**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Upptøka til journalistútbúgving

Tey, ið ætla sær til upptøkuroynd til útbúgving á Danmarks Journalisthøjskole, fáa upplýsingar um útbúgvingina á heimasíðuni hjá skúlanum: www.djh.dk, og søkjast skal um upptøku umvegis heimasíðuna: www.kot.dk. Tey, sum ikki hava møguleika at søkja um upptøku á alnótini, kunnu venda sær til Mentamálaráðið og fáa tilfar og umsóknarblað sendandi.

Umsóknarblað og prioriteringskema skulu verða skúlanum, ið umsøkjarin hevur sum 1. ynski, í hendi í seinasta lagi 15. mars 2004, kl. 12.

Upptøkuroyndin verður leygardagin 1. mai 2004, kl. 8.00 í Mentamálaráðnum.

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72 - 100 Tórshavn
Tlf. 35 50 50 - T-postur: mmr@mmr.fo



# Útbúgving sum heilsuhjálpari!

Møguleiki er nú at søkja inn á Heilsuskúla Føroya

Heilsuhjálparaútbúgvingin er ein sera breið útbúgving, har næmingarnir læra at síggja menniskjað sum eina heild, bæði fysiskt, sálarligt, sosialt og andaligt.

**Endamál við útbúgvingini:**
at geva næmingunum førleika, so at teir kunnu stuðla fólki í at vera virkin í gerandisdegnum, so at tey í mestan mun kunnu liva sítt vanliga lív, umframt at veita einfalda sjúkrarøkt, við atliti at stuðli, røkt og umsorgan, har brúkarin býr.

**Uppbygnaður:**
Útbúgvingin byrjar í september 2004 og er liðug síðst í august 2005. Umleið 1/3 av tíðini er teori og 2/3 er starvsvenjing. Starvsvenjingin gongur fyri seg á ellisheimum, sambýlum og í heimarøktini.

Tú fært útbúgvingarstuðul undir útbúgvingini.

Minsta krav er 9. flokkur + eitt ára arbeiðsroyndir, ella 10. flokk.

Umsóknarfreistin er 15. mars 2004.

Hevur tú hug at søkja, ella vilt vita meira, so ring 372855.

**Heilsuskúli Føroya**
800 Tvøroyri
www.skulin.fo/ahd · heilsuskulin@skulin.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Býlingshúsið Vesturi á Flat**
Á stovninum eru tvær barnagarðstovur við 20 børnum í hvørjari og ein vøggustova við 12 børnum. 4 starvsfólk í hvørjari stovu.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið Vesturi á Flat**
Eftir einum pedagogi til barnagarðin at starvast 20 tímar um vikuna at byrja 1. apríl 2004 og fram til 30 september 2004 ella eftir nærri avtalu.

Leiðari: Elsa Klein Olsen, tlf. 318371
Petur Mohrsvegur 11
100 Tórshavn

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15.mars 2004.



FAROE
LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo


Internet Sosialurin




# Starvsfólk til Rókina

Á Rókini, ið er bústovnur undir Almanna- og Heilsumálastýrinum, eru 2 fulltíðarstørv leys at søkja frá 1 Apríl 2004.

Rókin er ein landsstovnur fyri 5 børn/ung við m.a. skúla- og sosialum trupulleikum.

Vit vænta, at tey ið sett verða, eru før fyri at arbeiða í sera tøttum samstarvi við bæði vaksin og børn og eru opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum.

Fólk, ið sett verða, skulu hava viðkomandi útbúgving/royndir og verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi tann 21. mars. 2004

Nærri fast at vita um størvini við at venda sær til Súsan Johansen, leiðara, á tlf. 318914.

**Rókin**
Garðsgøta 31
160 Argir



# Kunngerð

## Um broyting av Býarplaninum fyri Runavíkar kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Býráðið á fundi 11/12-03 hevur viðtikið at gera broytingar í býarplaninum á Glyvrum og Saltangará og á fundi 26/2-04 hevur viðtikið at gera broytingar í býarplaninum fyri Lamba.

Broytingin á Glyvrum umfatar nýtt B-øki á G1-øki á Langanesi og umfatar broytingin hesar matriklar:
**Matr. nr. 34 – 35 – $36^{a}$ – $38^{a}$ – $39^{a}$ – $39^{b}$ – $41^{a}$ – $41^{b}$ – $41^{c}$ og matr. nr. $44^{a}$ Glyvra bygd.**

Broytingin í Saltangará umfatar nýtt B-øki á G1-øki eystan fyri Leitisveg og umfatar broytingin hesar matriklar:
**Matr. nr. 138 – $139^{a}$ – $146^{a}$ – $146^{b}$ – $148^{a}$ – $276^{a}$ – $276^{b}$ og matr. nr. $276^{c}$ Glyvra bygd.**

Broytingin í Lamba umfatar nýtt B-økio g nýtt A1-øki á G1-øki eystan fyri vegin niðan á Hústoft og umfatar broytingin hesar matriklar.
**Matr. nr. $27^{a}$ – $44^{a}$ – $45^{a}$ – $90^{a}$ og litra »b« Lamba bygd.**

Broytingarnar eru til skjals á býráðsskrivstovuni í upplatingartíðini frá 3. mars til og við 24. mars 2004.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu vera býráðnum í hendi í seiansta lagi 3. juni 2004.

Runavíkar Kommuna.

Saltangará tann 01.03/2004
**Runavíkar býráð**



# Professari

## Fróðskaparsetur Føroya Náttúruvísindadeildin

Fróðskaparsetrið søkir eftir einum professara í jarðalisfrøði/kolvetnisverkfrøði. Umsøkjarar við líknandi frøðigreinum eru eisini vælkomnir at søkja starvið.

Roknað verður við, at professarin verður leiðandi í arbeiðinum at menna og víðka samstarvið við aðrar granskingarstovnar og við oljufeløg, sum hava fingið og fara at fáa leitiloyvi í føroyskum øki. Professarin skal samskipa útbúgving á Náttúruvísindadeildini við atliti at undirgrund og frálandsvinnu, og undirvísa í evnum hesum viðvíkjandi.

Leiting eftir og útvinning av olju og gassi í føroyskum øki krevja serkunnleika við atliti at føroysku undirgrundini og frálandsvinnuni. Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya fór tí undir virksemi á hesum øki í 1998. Ein professari varð tá settur í parttíðarstarv, ein Ph.D.-verkætlan um bergmekanikk varð sett í verk og ein B.Sc. útbúgving í kolvetnisverkfrøði varð boðin út. Í løtuni eru tríggjar Ph.D.-verkætlanir og ein Post.Doc.- verkætlan í gongd við atliti at undirgrund og frálandsvinnu.

Ein metingarnevnd verður sett at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at umsøkjararnir fáa upplýsing um raðfestingina av øllum umsøkjarunum umframt metingina um teirra egna førleika.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

Nærri upplýsingar fáast við at seta seg í samband við Hans Paula Joensen, megindeildarleiðara, teldupostur: hanspj@setur.fo

Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), avritum av próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum ritgerðum (í 4 eintøkum) mugu vera Setursskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 31. mars 2004.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
J. C. Svabosgøta 14
100 Tórshavn

*Náttúruvísindadeildin (NVD) á Fróðskaparsetrinum veitir Bachelor of Science (B.Sc.) útbúgvingar innan lívfrøði, ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, teldufrøði og jarðalisfrøði. Í einstøkum førum ber til at taka Ph.D.-útbúgving. Undirvísingin verður veitt av starvsliðnum á NVD, sum telur 7 fólk, 5 adjungeraðum lektarum/professarum við fakligari ábyrgd av ávísum skeiðum og av umleið 40 uttanseturs undirvísarunum, ið eru á øðrum stovnum og virkjum bæði í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru 4 Phd-verkætlanir og ein Post. Doc. verkætlan í gongd á NVD. NVD luttekur í granskingarverkætlanum bæði innanlands og í altjóða samstarvi við aðrar stovnar.*



# Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir 3 farmakonomnæmingum, at byrja 3. mai 2004.

Eitt læruplláss er á Eysturoyar Apotek og hini bæði á Tjaldurs Apotek.

Ert tú áhugað/ur at nema tær útbúgving innan apotek, kunnu vit bjóða tær eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum:

Læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum, hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.

Læra at arbeiða saman við nógvum starvsfólki, at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambært galdandi lógum og kunngerðum.

Læra at geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeining í sambandi við útflýggjan av apotekaravørum.

Útbúgvingin tekur 3 ár, og fer fram á Eysturoyar apoteki í Runavík og Tjaldurs apoteki í Tórshavn, í samstarvi við Farmakonomskúlan í Hillerød í Danmark. Næmingurin skal í skúla 1-4 vikur í senn, íalt 7 ferðir í lærutíðini. Próvtøka er á skúlanum á 2. og 3. ári.

Krøv til umsøkjaran: Students/HF prógv, HH ella HT.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Tjaldurs Apotek**
Postboks 3010
110 Tórshavn

áðrenn 16. apríl 2004.



# Lágargarður

Røktar- og Umlættingarheimið Láargarður lýsir eftir avloysara fyri leiðandi ergoterapeut í barnsburðarfarloyvi í tíðini 1. apríl 2004 og væntandi til 31 des. 2004. Ergoterapeutur, sum ikki er áhugaður í leiðslustarvið kann eisini søkja.

Starvið er fulltíðarstarv, lønt sambært sáttmála ímillum felagið Føroyskir Ergoterapeutar og Fíggjarmálastýrið.

Starvið er avgjóðandi og mennandi og inniber umframt leiðsuuppgávurnar:
- ADL metingar og venjingar og viðlíkahaldsvenjingar
- fyribyrgjandi venjingar og viðlíkahaldsvenjingar
- vegleiðing og upplæring av einstaka brúkaranum í nýtlsu av ergonomiskum hjálpartólum
- vegleiðing og upplæring av starvsfólki á stovninum og í Heimarøktini í nýtslu av ergonomiskum hjálpartólum

Hevur tú áhuga og helst royndir í arbeiði í eldrarøktini, skal umsókn sendast til leiðaran á Lágargarði

Stoffalág 84
Box 1188
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist er 23. mars 2004**



Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi

Beinleiðis frá framleiðara

Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820